# Oggi Art í Søldarfirði latið upp

**Í gjár var móttøka á nýggja listgrafiska verkstaðnum, Oggi Art, sum 35 ára gamli listamaðurin, Oggi Lamhauge, hevur lagt lunnar undir í heimbygd síni, Søldarfirði**

MÓTTØKA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nógv fólk var inni á gólvinum og ynsktu listamanninum góða eydnu við tiltakinum.

Saman við 18 ymiskum listaverkum, sum Oggi hevur hangandi í nýggju hølunum, settu blómur og skrivligar heilsanir eisini sín dám á hølini, sum eru sett í stand til endamálið.

Oggi sigur, at hølini í fyrsta lagi verða verkstaður við litografiskari pressu og koparprentspressu.

– Aftrat hesum er so alrúmið, sum eitt nú kann nýtast til framsýningar og undirvísingarhøli, sigur hann.

Tað er gamli handilin hjá Lenu og Sámal Jákupi Lamhauge í Søldarfirði, sum listamaðurin hevur latið seta í stand.

Hóast húsini, sum liggja við høvuðsvegin í Søldarfirði, ikki tykjast so stór við fyrsta eygnabráð, eru tey kortini einar 60 fermetrar til støddar. Tey eru ljós og kennast rúmlig og hugnalig.

### Virkin listamaður

Oggi er útbúgving sum listgrafikari við lærda háskúlan í Reykjavík í 1997, og hann hevur verið virkin á listarliga økinum seinastu árini, bæði her heima og uttanlands.

Hann hevur gjørt hópin av serprentum fyri stovnar og virkir, og hann hevur eisini undirvíst bæði børnum og vaksnum í tekning, máling og grafikki.

Kendasta verkið hjá Ogga Lamhauge er ivaleyst altartalvan í Hattarvíkar kirkju, sum hann læt kirkjuni í 2001.





*Oggi er útbúgvin listgrafikari og er virkin listamaður. Við móttøkuna í Søldarfirði í gjár vóru nógv fólk inni á gólvinum og heilsaðu listamanninum, f.v.: Hans Jacob Lamhauge, Petur Alberg Lamhauge og Oggi Lamhauge*

*Myndir: Vilmund Jacobsen*

# Útróðrarmenn rokast á útróðri

**Bátar, sum vóru á útróðri í gjár, løgu millum 200 og 250 pund á línuna. Tíðliga í góðveðrinum í morgun loystu bátarnir aftur**

ÚTRÓÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er stuttligt at vera útróðrarmaður í hesum døgum, nú veðrið er so gott, og streymurin er góður.

Týsdagin var fínasta veður, og soleiðis er eisini í morgun.

Veðurfrøðingurin, Petur Skeel Jacobsen, sigur, at veðrið framvegis verður gott í morgin, men síðan fáa vit eitt lot upp í einar 10 metrar av útsynningi og vestri.

Hjá bátunum, sum royna eystanfyri og ikki eru ov smáir, kann tískil væntast, at tað framvegis verður roynandi, um hann frískar vindin nakað.

### Nógvur fiskur

Men tað er ikki bara veðrið, sum hevur verið gott seinastu dagarnar. Tað hevur fiskiskapurin hjá útróðrarbátunum eisini verið.

Bátar, sum vóru á útróðri týsdagin, høvdu sum heild nógvan fisk.

Sosialurin hevur frætt av Toftum, bygdum norðanfyri á Eysturoynni og úr Nólsoy, at fiskiskapurin hevur verið góður. Hjá teimum, sum hava roynt eystanfyri, hevur meginparturin av veiðini verið hýsa, meðan bátarnir norðanfyri hava fingið væl av tosk.

### Góðar setur

Fleiri av bátunum løgu í gjár millum 200 og 250 pund á línuna, og tað má sigast at vera góður fiskiskapur.

Útróðrarbátar, sum í gjár vóru við góðum 20 línum, hava soleiðis fingið upp í eini 5.000-7.000 pund.

Best dámar útróðrarmonnum, sum egna gággu, at gággan er fesk – og ikki hevur verið fryst, men nú uppiløgur hevur verið leingi, stendur línan egnd við frystum agni.

Spennandi verður at síggja, hvussu dagurin í dag fer at roynast hjá bátunum.



*Tað er stuttligt at vera útróðrarmaður í hesum døgum, nú veðrið er so gott, og nógvur fiskur er at fáa*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## 332 tons á søluni í morgun

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á telefonsøluni og á gólvinum hjá Fiskamarknaði Føroya í morgun vóru tilsamans 332 tons til sølu.

Høgni Hansen á Fiskamarknaði Føroya sigur, at eini 84.000 pund av útróðrarfiski vóru á gólvsøluni; umleið helmingurin á Toftum og hin helmingurin í Klaksvík, Sørvági, Tvøroyri og í Vági.

Aftrat hesum vóru einar 29 telefonsølur tilsamans.

### Fallin nakað

Spurdur, um fiskaprísurin er fallin, nú so nógv er á marknaðinum, sigur Høgni, at prísurin á hýsu er fallin nakað, meðan prísurin á toski framvegis er støðugur og góður.

– Hýsan, sum útróðrarbátarnir fingu í gjár, er í stóran mun hýsa 3, og her er prísurin fallin umleið eina krónu fyri kilo – úr umleið 10 krónum niður í 9.

Hann heldur, at hugsandi er, at hýsuprísurin fer nakað longur niður, um talið av útróðrarbátum verður líka stórt í morgin, sum væntandi er, nú veðrið framvegis er so gott.

### Á telefonini

Høgni Hansen sigur, at fleiri útróðrarbátar, sum hava fiskin í ísvatni og hava meira enn eini tvey tons, plaga at selja fiskin um telefonsøluna.

– Men tað eru eisini fleiri bátar, sum selja fiskin á gólvinum, ið hava fiskin í ísvatni, sigur hann.